# Inuugujoq, Finnurmik ateqarpunga



*Anaana og Finnur eiga trý børn, og tey skulu veksa upp í Grønlandi*

**Síðani 1. august hevur tann 31 ára gamli Finnur Eldevig arbeitt sum lækni á heilivágdeildini á Dronning Ingrids Hospital í Nuuk**

GRØNLAND

*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Finnur er fuglfirðingur ella rættari sagt hálvur. Pápin er úr Fuglafirði, mamman grønlendsk. Finnur sleit sínar fyrstu barnaskógvar í brekkunum í Fugafirði, men tá hann var tíggju ára gamal, gjørdu foreldrini av at flyta til Grønlands, har tey búsettu seg í Sisimiut (fyrr Holsteinsborg). Har vaks Finnur so upp saman við hinum systkinunum.

Í 1999 gjørdi Finnur av at fara til Danmarkar at læra til lækna á lærda háskúlanum í Århus. Í frítíðini spældi hann fótbólt og tók lut í ymsum øðrum frítíðarvirksemi, og hann hevði eisini gagn av tí góða sosiala netverkinum millum grønlendingar í býnum. Har var hann ofta saman við øðrum grønlendingum í Det Grønlandske Hus.

- Tað eru eisini nógvir føroyingar í Århus. Komst tú ikki saman við teimum?

- Jú, eg hevði samband við føroyingar í Århus, men eg var so mikið ungur, tá vit fluttu og havi bara verið nakrar ferðir í Føroyum síðani, so eg kendi meg tættari knýttan at grønlendingunum og hevði eisini lættari við at tosa við teir um dagsins viðurskifti, sigur Finnur Eldevig.

## Gott arbeiðspláss

Í løtuni eru 22 grønlendingar í Danmark og læra til lækna, og herfyri visti útvarpið í Nuuk at siga, at allir ætla sær aftur til Grønlands, tá útbúgvingin á lærda háskúlanum er liðug.

Finnur Eldevig ásannar, at áhugin fyri at fara aftur til Grønlands er stórur millum teirra, sum læra til lækna í Danmark, og sjálvur heldur hann, at hetta millum annað kenst av tí góða sambandinum, sum er millum lesandi grønlendingar í Danmark. Hjá teimum, sum læra til lækna, hevur tað eisini týdning, at Dronning Ingrids Hospital hevur gott orð á sær og er kent fyri sítt góða arbeiðsumhvørvi, og tað er serliga umráðandi hjá teimum, sum hava børn, sigur hann.

Dronning Ingrids Hospital í Nuuk er nógv tað størsta í Grønlandi og kann samanberast við Landssjúkrahúsið í Havn. Har arbeiða millum 40 og 45 læknar, og karmarnir eru góðir. Finnur Eldevig heldur, at sum lækni á sjúkrahúsinum í Nuuk hevur hann eitt breiðari arbeiðsøki enn hansara starvsfelagar í Danmark og aðrastaðni.

- Í Danmark kanst tú koma at arbeiða í eitt hálvt ár á einari serdeild, sum bara hevur fólk við nýrasjúkum. Men her sleppi eg at royna ymiskt, sum mínir donsku starvsfelagar ikki fáa høvi til, og tað gevur mær eina breiðari útbúgving, sum eg kann brúka her í Grønlandi.

## Grønland heimlandið

Sjálvur hevur hann avtalu við sjúkrahúsið í hálvt annað ár. Ta fyrstu tíðina skal hann arbeiðs á heilivágdeildini, og haðani fer hann á skurðdeildina. Ætlanin er at halda fram á sjúkrahúsinum í Nuuk nøkur ár eftir tað. Men hann verður neyvan verandi í Nuuk og kundi heldur hugsað sær at arbeitt onkra aðrastaðni um nøkur ár.

- Hvat við Føroyum?

- Jú, eg kundi væl hugsað mær at flutt til Føroya eina ferð seinni og arbeitt har eitt tíðarskeið, men tað verður so ikki, fyrr enn børnini eru vaksin.

Hálvi fuglfirðingurin dylur ikki fyri, at hóast hann hevur verið í Danmark í fleiri ár, so er Grønland heimlandið.

- Grønland er framvegis mítt heim, og her skulu okkara børn veksa upp, sigur Finnur Eldevig.




*Dronning Ingrids Hospital í Nuuk*



*-Eg var so ungur, tá eg flutti úr Føroyum, at tað var lættari at samskifta við grønlendingarnar í Århus*